# Reykjavík – lítil býur við stórum upplivingum

Í íslendska høvuðsstaðnum er ein hópur av ymiskum spennandi at uppliva.

Í høvuðsstaðnum Reykjavík, ið hevur umleið 120.000 íbúgvar er eitthvørt fyri ung sum gomul. Nevnast kann Hallgrímskirkjan, sum er størsta kirkja í Íslandi við sínum 74,5 metrum. Um farið verður upp í tornið, bíðar ein vøkur sjón yvir alt Reykjavík - ein sonn uppliving.

Ein túr niðan í Perluna kann viðmælast. Har er eisini møguleiki fyri at síggja alt Reykjavík. Høvi er at keypa ein kaffimunn við onkrum søtum afturvið og njóta útsýnið. Matstova er ovast uppi í Perluni, og her kann ein góð máltíð njótast, meðan gólvið spakuliga melur runt.

Laugardalur, ið hevur størsta uttandura svimjihyl og heitar pottar, er opin alt árið, og má bara roynast. Somuleiðis finst ein djóragarður við einamest íslendskum djórum, alt frá reinsdjórum, revum og kópum, til kýr, hestar og seyð.

Í Reykjavík eru framúr góðir møguleikar fyri at "shoppa". Gongugøtan niðri í býnum hevur nógvar handlar og café'ir. Uppi í Kringluni finnur man alt frá klæðum til matvørur.



**LITFAGUR**

*Reykjavík er ein litfagur og livandi býur*

